# Stríðið fyri sjálvsøgdum rættindum er vunnið

**– Tað er ikki uppbyggjandi, at politiski myndugleikin leggur seg út í viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum, men tað nyttar heldur ikki hjá fakfeløgunum at halda lív í einum óveruligum klassastríði, segði løgmaður á Landsfundi javnaðarfloksins í morgun**

LANDSFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialinum.fo*

– Hvussu vit so venda so snara tí, slepst ikki undan, at vit eru øll við á sama liði og í sama leiki. Men tíverri síggja vit alt ov ofta, at vit seta okkum við føtur í spenni og toga í hvør sína ætt, heldur enn at draga eina línu.

Tað segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, á landsfundi javnaðarfloksins leygarmorgunin

Í formansfrágreiðing síni nam hann við viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum og í tí sambandinum kom hann eisini við nøkrum, ið kann takast sum eitt aftursvar til teir fakfelagsformnenn, sum í Sosialinum fríggjadagin, funnust hvassliga at tí førda politikkinum hjá javnaðarflokkinm.

### Klassastríðið farið í søguna

Løgmaður ásannaði, at tað eru nógvir partar, sum hava týðandi leiklutir í einum framkomnum samfelagi og nakrir av hesum pørtunum eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum.

– Tí skal tað vera mín áheitan á arbeiðsmarknaðin, at vit seta okkum niður í friðartíðum og taka upp eitt mennandi kjak um, hvussu vit frægast leggja viðurskiftini til rættis, ljóðaði boðini í formansfrágreiðing løgmans á landsfundinum í morgun.

Og hann helt fram:

– Tað byggir onki upp, at vit frá almennari síðu leggja okkum út í tykkara viðurskifti, tað eru vit fullgreið yvir, men eins lítið dugur tað, at tit halda lív í einum fiktivum klassastríði, sum fyri langari tíð síðani er farið í søguna.

Løgmaður vísti á, at tá ið undangongufólkini í politikki og í fakfelagsrørsluni stríddust fyri grundleggjandi rættindi og sjálvsøgdum rættindum, mugu vit í dag ásanna, at hetta stríð varð vunnið.

– Men eftirkomarar hjá teimum, sum tá vóru í miðdeplinum í stríðnum, eru í dag tey, sum ynskja góðar útbúgvingar, góð ansingartilboð og góð pensjonsviðurskifti og annað.

– Soleiðis flytir heimurin alsamt, staðfesti løgmaður.

### Hava tørv á dialogi

Løgmaður segði, at samfelagið hevði tørv á einum opnari, breiðari og konstruktivari dialogi.

– Men tað skal ikki vera ein einvegis monologur frá politikarum, men ein dialogur, eisini við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

– Vit mugu fáa dialogin at virka. Vit hava so sanniliga brúk fyri tykkara meiningum og eg meti enntá, at tað er tykkara skylda at vera við í almenna samfelagskjakinum.

Men so heitti hann eisini á fakfeløgini um at savna seg í eina sterkari eind.

Tað nyttar lítið, at, at ein rópar í eyst og annar í vest. Vit hava tørv á einari rødd frá fakfelagsrørsluni, eins og vit nú í nøkur ár hava havt eina rødd frá arbeiðsgevarunum ígjøgnum Vinnuhúsið.

– Hetta kann bert styrkja kjakið og í seinasta enda avgerðirnar, ið tiknar verða, segði løgmaður.



*Á landsfundi í javnaðarflokkinum í morgum, heitti løgmaður á fakfeløgini um at savna seg, tí tað nyttar onki, at ein rópar í eyst og annar í vest, segði hann*

# Landskassin bundið fýra milliardir krónur niður



vera einasti eigari av banka, flakvirkjum, fiskasølu, flogfelagi og mangt annað.

Í øllum almennu fyritøkunum standa í dag einar 4 milliardir almennar krónar bundnar.

– Vit hava væl loyvi at spyrja um tað nú er rætt, at so nógvir pengar liggja niðurbundnir, um so er, at hesar fyritøkur eins væl, ella kanska betur, kunnu rekast av øðrum eigarum. – Vit javnaðarfólk kunnu væl eisini seta okkum spurningin, um ikki henda risaupphædd var betur farin við at vit gjalda okkara almennu skuld niður og harvið frígera fíggjarliga orku til víðari útbygging av okkara vælferðarskipanum.

Løgmaður staðfest eisini, at um javnaðarfólk vildu tað ella ikki, so er ein meiriluti uttanum okkum á tingi í dag fyri at fara undir varisligar einksiljingar av almennum fyritøkum.

– Nokta vit at fara upp í eitt kjak um einskiljingar, stinga vit høvdið í sandin og so sótu vit fyri tað fyrsta neyvan í nakrari samgongu. Fyri tað næsta, hevði ein meiriluti í løgtinginum framt hesar einskiljingar júst eftir teirra høvdi, har neyvan øll fyrilit vórðu tikin.

– Nú eru vit við, og vit hava beinleiðis møguleika at ávirka einskiljingar, soleiðis at tær koma at henda á ein hátt, sum vit kunnu taka undir við.

Løgmaður segði eisini, at Ein afturgjalding av almennu skuldini er rættiliga avgerandi, tá vit tosa um ein sjálvberandi búskap.

– Og sjálvandi vilja vit eisini hava ein sjálvberandi búskap. Ein búskap, har hetta samfelagið sjálvt megnar at skapa neyðugu inntøkurnar, er so avgjørt eisini eitt mál fyri Javnaðarflokkin, lat tað standa púra greitt.

– At vit hava ein ríkisstuðul, sum vit hava brúk fyri í dag, er ikki tað sama sum, at vit fyri allar ævir skulu hava ein ríkisstuðul. Vit skulu eisini á búskaparliga økinum standa á egnum beinum, tó uttan at forkoma tí, sum vunnið er, segði løgmaður.

### Vælferð krevur vøkstur

Samstundis staðfesti løgmaður í formansfrágreiðing síni, at vælferð krevur vøkstur í búskapinum.

– Hava vit ikki vøkstur í okkara búskapi, so hava vit heldur ikki orku til at halda fast um tað, sum er vunnið og enn minni orku til framhaldandi batar og framstig. Tí er búskaparvøkstur ikki eitt liberalistisk gandaorð, ella nakað tey borgarligu hava patent uppá, men tað er so avgjørt ein sosialdemokratisk fortreyt.

– Hygg at okkara grannalondum, sum liggja fremst í heiminum, hvat vælferð viðvíkur. Tað, sum eyðkennir hesi lond, er fyrst av øllum ein semja um, at samfelagið skal skipast við møguleikum og trivnaði fyri øll, men veruliga grundin til, at henda útbygging hevur gingið so væl, er at hesi lond hava dugað at skapt ein støðugan búskaparvøkstur.

Tí heldur løgmaður, at javnaðarfólk mugu hugsa munandi meiri um, at hesin vøkstur er neyðugur og tí má flokkurin leggja seg eftir at skapa karmar fyri, at vøksturin verður so støðugur sum gjørligt. Hetta gera vit við at hava eitt virkið og dynamiskt vinnulív.

Tí skal javnaðarflokkurin hava ein munandi virknari leiklut, tá vinnupolitikkur verður viðgjørdur.

– Vit skulu hava boð upp á teir karmar, sum gevur vinnuni dynamikk, og vit skulu skipa so fyri, at okkara marknaðaratgongd støðugt verður bøtt og víðkað. Vit skulu hava boð upp á, hvussu vit støðugt menna okkara arbeiðsorku til tær bestu fortreytirnar við góðum útbúgvingartilboðum, har málið skal verða, at øll skulu hava so gott útbúgvingargrundarlag sum gjørligt at standa á.

Men hann helt eisini, at tað er líka týdningamikið at vit eisini hava eitt gott granskingarumhvørvið, sum stuðlar uppundir okkara vinnu - bæði verandi vinnu og nýggjar vinnur.

– Og nýggj vinnutiltøk skal tað almenna hjúkla um, tí tað er júst her, at vøksturin kann liggja. Vit skulu stuðla ígongdsetarum við rágeving og møguleikum, so tey styrkna í byrjanini heldur enn at verða køvd, sum vit tiverri alt ov ofta hava sæð.

### Eisini okkara veruleiki

Jóannes Eidesgaard spurdi eisini um alheimsgerðin er ein hóttan, ella ein møguleiki

– Rætta svarið er, at hon er bæði, men vit hava einki annað val enn at vera við. Vit hava ikki møguleika til at vísa henni frá okkum ella at byrgja okkum inni, tí um vit vilja tað ella ei, so rekur hon inn á okkum. Alheimsgerðin er ikki bert ein veruleiki rundan um okkum - hon er okkara veruleiki.

– Hetta merkir at kappingin nú ikki bara er innanlands, men vit hava allan heimin sum kappingarneyta. Tí er tað so ótrúliga týdningarmikið, at vit fokusera upp á tað, sum vit gera betur enn onnur og minni upp á tað, sum onnur gera betur og bíligari enn vit.

Løgmaður vísti á, at ein týðandi partur av alheimsgerðini er eisini, at vit fáa ta marknaðaratgongd, sum gevur okkum bestu treytirnar. Vit kunnu ikki sita her í Norðuratlantshavi og ræðast restina av heiminum.

Tí vil landsstýrið arbeiða fyri einum EFTA limaskapi, sum als ikki merkir, at vit ikki samstundis skulu betra munandi um okkara samstarv við ES.

– Isolatiónspolitikkurin verður okkara vissi deyði, so her er einki val segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður.